MIÐSTØÐIN

# Handilstreytir og prísir, galdandi frá 1. juli 2011





Miðstøðin P/F - Toftagjógv 5 - FO-650 Toftir - Føroyar

Tel. +298 44 99 50 - Faks. +298 44 99 53 - t-postur: post@kassi.fo

www.kassi.fo

# Eitt sindur um Kassamiðstøðina

Kassamiðstøðin var stovnað í 1995, tá standurin á fiskakøssum var sera vánaligur.
Tað var Føroya Ráfiskakeyparafelag, sum tók stig til stovnanina. Tá var ein akuttur tørvur at fáa skipaði viðurskifti. Tað fyrsta Kassamiðstøðin gjørdi var at seta standardir, sum umfataðu m.a. kassasløg, litir, merking, pantiprísir o.s.v.
Mestsum allir teir gomlu kassarnir vóru vrakaðir. Nýggir og fleiri kassar vóru keyptir ístaðin fyri teir vrakaðu. Kassamiðstøðin er í dag eitt tyssi av feløgum, sum hava hvør sína uppgávu:

**KASSI P/F** umsitir upprunaligu panti-kassaskipanina.

**VASK Sp/F** vaskar kassar og plattar.

**SMÁSØLA Sp/F** leigar út 1000 l kassar, og hevur ymiskar vørur at selja.

**MIÐSTØÐIN P/F** er móðurfelagið, eigur hini feløgini 100%, og hevur alla umsiting um hendi.

Føroya Ráfiskaseljarafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag eiga hvør sína helvt av partapeninginum í MIÐSTØÐINI P/F

# KASSI P/F

Kassaskipanin hjá KASSA P/F hevur sum endamál, at gera tað so lætt sum gjørligt hjá vinnuni at handla fisk.

Hetta verður gjørt á tann hátt, at panti-kassarnir hjá KASSA P/F (sí s. 5) kunna flytast millum partarnar í vinnuni, alt eftir tørvi:

Kassarnir, sum KASSI P/F eigur, verða viðlíkahildnir, og eru altíð í góðum standi.

Hetta, saman við at tað altíð eru nóg mikið av køssum tøkir, merkir, at kundarnir hava møguleika at hava góðan fisk, og handla hendan til besta prís.

Fyri at gera nýtslu av hesi skipan, má kundi vera LIMIR hjá KASSA P/F.

Sí treytir fyri LIMASKAPI á síðu 3 til 5:

# Handilstreytir og prísir hjá KASSA P/F

**§ 1. Generelt**

1) KASSI P/F umsitir eina panti-kassaskipan til fiskivinnuna.

2) Hesar vørur (pantikassar) eru umfataðar av skipanini:

| Kassaslag: | | Pantiprísur fyri LIMIR |
|---|---|---|
| a) | 75 litur dynobox-kassar | 75 kr |
| b) | 90 litur persbox-kassar | 90 kr |
| c) | Plastplattar til 75 l og 90 l | 400 kr |
| d) | 380 litur kassar | 1200 kr |
| e) | 460 litur kassar | 1600 kr |

3) Øll vøra er merkt við navni og búmerki hjá KASSA P/F[1].

4) Øll vøra er ogn hjá KASSA P/F.

5) Kundin skal gjalda eitt pant, tá kundin fær vøruna útflýggjaða.

4) Pantið verður afturgoldið LIMUM óskert, tá vøran verður latin innaftur til KASSA P/F.

**§ 2) Limaskapur.**

1) Fyri at kunna gera nýtslu av tænastuni, KASSI P/F bjóðar, má kundin undirskriva avtalu við KASSA P/F.
2) Kundar, sum hava undirskrivað avtalu við KASSA P/F, fáa støðu sum LIMIR
3) Pantikassarnir mega ikki vera brúktir uttanfyri LIMA-skaran, og mega pantikassarnir tí bert flýggjast millum LIMIR og LIMIR, og millum KASSA P/F og LIMIR.
4) Dagførdur Limalisti er at finna á heimasíðu felagsins.

**§ 3) Nýtsla.**

1) Vøran hjá KASSA P/F má bert nýtast til fisk og fiskaúrdráttir.

**§ 4) Gjøld.**

1) Kassagjald.
   a) Fyri nýtsluna av køssunum skal kundin gjalda eitt kassagjald á 2x6 oyru av hvørjum kg., sum hevur verið í íløtum hjá KASSA P/F.
   b) Um landað verður í Føroyum, deila seljari og keypari kassagjaldið javnt ímillum sín (6 oyru í part).
      (i) Keyparin eftirheldur kassagjaldið frá seljara, og avroknar øll 12 oyruni við KASSA.
   c) Um landað verður uttanlands, skal Seljarin (skip) avroknað øll 12 oyruni til KASSA P/F.
   d) Kassagjaldið umfatar fylgjandi nýtslu: (sama gjald er galdandi, um kassar vera brúktir til eitt, fleiri ella øll punktini nevnd niðanfyri).
      (i) kassar umborð á skipum/bátum
      (ii) kassar, sum landað verður við/í

[1] Undantikið eru 75 l og partvíst 90 l kassarnir. Hesir eru hvítir uttan nakað merki.

(iii) kassar, sum fiskur verður fluttur í
(iv) kassar, sum fiskur verður goymdur í og
(v) kassar, sum fiskaslógv verður goymt/flutt í.

2) Útflutningsgjald.
   a) Um kassar vera brúktir til at flyta fisk av landinum í (til eksport), so skal útflutningsgjald á 15 oyru pr. Kg. gjaldast, útyvir kassagjaldið nevnt omanfyri.
3) Limagjøld til Ráfiska Seljarafelagið og Ráfiska Keyparafelagið.
   a) Um ikki annað er avtalað, heinta vit inn limagjøld fyri omanfyrinevndu feløg saman við kassagjaldinum.
   b) Limagjøldini eru ½ oyra pr kg. fyri hvørt felag, ella samanlagt eitt oyra pr. kg.
4) Innrapportering.
   a) Kundin skal uppgeva øll tey kg. tøl, sum KASSI P/F biður um. Um ikki annað er avtalað, skulu tølini uppgevast hvønn kalendaramánaða sær. Í hesum sambandi sendir KASSI P/F kundanum ein formular, sum skal fyllast rætt út, og sendast KASSA P/F aftur áðrenn 10 dagar. Kundin hevur prógvbyrðu fyri, at uppgivnu tølini eru røtt.
   b) Um kundin ikki sendir uppgerðir til tíðina, verður rykt sum fylgir.
      (i) Áminning 1 (min 10 dagar eftir deadline. Eftir áminning 2 verður møgulig kreditsaldo ikki útgoldin).
      (ii) Áminning 2 (min 30 dagar eftir deadline. Eftir áminning 3 kemur eitt eykagjald á 5000 kr + 6 oyru í eykagjaldi av øllum Kg.).
      (iii) Áminning 3 (min 50 dagar eftir deadline. Um einki er frætt áðrenn 10 dagar, verður kundin bólkaður sum IKKI-LIMUR. Fyri at gerast LIMUR aftur, skulu allar manglandi uppgerðir sendast inn, og møgulig gjøld gjaldast. Harafturat er eitt eykagjald uppá 6 oyru av øllum kg sum uppgerðirnar umfata + 5000 kr).
   c) KASSI P/F kann - av sínum eintingum, ella um illgruni er um skeivleikar – krevja kundan eftir váttan/útskrift frá fiskiveiðueftirlitinum, grannskoðara kundans ella øðrum relevantum stovnum og virkjum. Um skeivleikar vera funnir við hesum eftirkanningum, kann 3 dupult gjald gjaldast av funnum feilum. Rykt verður eftir hesum váttanum/útskrivtum eftir somu treytum sum § 4)4)b)
      (i) Kannast kann 5 ár aftur í tíðina.

**§ 5) Viðlíkahald og endurnýggjan.**

1) KASSI P/F hevur alla ábyrgd av viðlíkahaldi, avskrivingum og endurnýggjan av pantivøruni.
2) Um pantivøra verður 'mishandlað', verður kundi skuldskrivaður fyri tvær ferðir pantivirði á vøruni.
   a) Sum mishandling verður m.a. roknað:
      (i) Nýtsla av køssum til at goyma trolgreiðir o.a.t. í.
      (ii) Um kassar vera fluttir, uttan at lyfta hesi upp frá undirlagnum. (sum dømi kann nevnast, at trukkar við tveimum gaflum, koyra við tveimum stakkum av køssum, og lata uttara part av køssunum skava móti undirlagi.)

**§ 6) Gjaldstreytir.**

1) Øll gjøld sambart § 1) og § 4) skulu gjaldast kontant. Møgulig kreditsaldo verður útgoldin áðrenn 7 dagar. Útgjaldið er tó treyta av, at treytir fyri limaskapi eru yvirhildnar. (sí § § 4)4)b))

**§ 7) Leveringstreytir.**

1) Øll vøra verður leverað/móttikin av/á goymslu Toftir.
2) Ein minni goymsla er á Tvøroyri. Um hendan goymslan verður brúkt, eru hesar treytir galdandi:
   a) Tal av útflýggjaðum og innlatnum køssum skal vera støðugt, roknað pr kassaslag pr mánaða pr. kunda.
   b) Um neyðugt er at flyta kassar til ella frá goymsluni, skal tann kundin, sum hevur ein mun á innlatnum og útflýggjaðum køssum, gjalda fyri hendan flutning.
   c) Hetta gjald verður roknað afturút pr mánaða, og verður ongantíð størri, enn tað gjald, KASSI P/F hevur brúkt uppá nevnda flutning.

**§ 8) Avgreiðslutíðir.**

1) Goymslan er opin frá 08:00 til 16:00 allar vanligar gerandisdagar.
2) Um tørvur er á avgreiðslu uttanfyri vanliga arbeiðstíð, er møguligt at avtala hetta frammanundan, ímóti einum úrtíðargjaldi:
   a) Vanl. arbeiðsdagar 16:00 til 21:00: Kr 200 fyri hvønn byrjaðan tíma.
   b) Vanl. arbeiðsdagar 21:00 til 08:00: Kr 350 fyri hvønn byrjaðan tíma.
   c) Vanl. leygardagar: Kr 350 fyri hvønn byrjaðan tíma.
   d) Sunnu og halgidagar: kr 500 fyri hvønn byrjaðan tíma.
3) Minsti takstur er 2 tímar, um fólk skal tilkallast eftir arbeiðstíð.

# Fakta um pantikassarnar



## 75 litur kassi

Vekt: 4,2 kg – mát: 89 x 56 x 23,6 cm
Tekur uml. 40 kg av ísaðum fiski
Kunna setast niður í hvønn annan, so teir fylla minni tómir

**Kr. 75,-**



## 90 litur kassi

Vekt: 5,3 kg – mát: 84,5 x 51,5 x 26 cm
Tekur uml. 50 kg av ísaðum fiski
Gamli trolara-kassin

**Kr. 90,-**



## Plastplattur

Vekt: 19 kg – mát: 106 x 87,5 x 15 cm
Passar bæði til 75 og 90 l kassan

**Kr. 400,-**




## 380 litur kassar

Vekt: 29 / 35 kg – mát: 75 x 95 x 75 cm
Tekur uml. 250 kg av ísaðum fiski
Verður brúkt til útróðrabátar

**Kr. 1200,-**




## 460 litur kassar

Vekt: 50 kg – mát: 103 x 123 x 58 cm
Tekur uml. 300 kg av ísaðum fiski
Avloysarin hjá 660 l kassanum

**Kr. 1600,-**

# Leigukassar frá SMÁSØLU Sp/F

Er tørvur á stórum køssum eina avmarkaða tíð, so hava vit 1000 l leigukassar, sum kunna leigast í stytri ella longri tíðarskeið.

Leigan verður roknað pr. kassa pr. dag, og leigurokning send fyri hvønn mánaða sær.

Íroknað leiguna er vanligt slit og vask, tá kassin verður latin innaftur, men ikki flutningur til og frá okkara goymslu á Toftum.

Um kassin verður burtur í tykkara varðveitslu, skal hetta endurgjaldast.

| | **Leiguprísur pr dag** | | **Endurgjaldsprísur** |
|---|---|---|---|
| **1000 litur leigukassi** | **Dagur 1:** | **70,-** | **Kr. 3500,-** |
| | **Dagur 2-60:** | **7,-** | |
| | **Dagur 60+:** | **4,30** | |
| **Lok til 1000 litur leigukassa** | **Dagur 1:** | **40,-** | **Kr. 1300,-** |
| | **Dagur 2-60:** | **3,-** | |
| | **Dagur 60+:** | **2,-** | |



# Vask av køssum hjá VASK Sp/F

Vit kunna vaska kassar fyri tykkum.

Vaskað verður við heitum vatni og kaustiskari sodu, soleiðis at kassarnir gerast heilt reinir.

Vatn og hiti verða endurnýtt, so árinið á umhvørvið gerst minst møguligt. Eftirlit er eftir vask, soleiðis at møguligir brotnir kassar verða tiknir frá. Soleiðis verður góðskan á leveraðum køssum best møgulig. Vit 'strappa' 90 l kassarnar eftir vask, soleiðis at teir kunna hivast beinleiðis umborð á skipini. Hetta ger landingarnar av skipum munandi effektivari.

**VASKIPRÍSIR :**

| | |
|---|---|
| **75 l kassi** | **Kr. 5,-** |
| **90 l kassi** | **Kr. 7,-** |
| **Plastplattur** | **Ókeypis** |
| **380 og 460 l kassar** | **Kr. 30,-** |
| **Aðrir kassar** | **Kr. 50,-** |



# MIÐSTØÐIN P/F

Upplýsingar um felagið:

**MIÐSTØÐIN P/F**
**Toftagjógv 5**
**650 Toftir**
**Telefon 449950**
**Telefax 449953**
**Tpost post@kassi.fo**
**Heimasíða: www.kassi.fo**
**Banki 6460 2018596**

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum og prísbroytingum. Allir prísir eru nevndir uttan MVG




**Góðan fisk - í góðar kassar**

**Góður fiskur skal hava bestu umstøður, um hann skal fáa besta prís.**